# Dátuverndarkunning

## 1. Innleiðsla

Faroe Maritime Services Sp/f, eisini nevnt FMS og Bátasølan er skrásett sum sjómeklaravirki eins og mynstringar virki.

Felagið veitir tænastur innan sjófyrisiting, lossingartænastur, skipa og báta mekling, mynstringar virksemi fyri sjófólk og umboðsvirksemi fyri útlendsk skip sum koma í Føroyska havn og skip í eru skrásett í Føroysku altjóða skipaskrásetingini.

Okkara arbeiðsøki er víðfevnt og til tíðir fevnir arbeiði um øki sum: projektstýring, ráðgeving, sjósýn, dagføringar, broyta skipskjøl og ráðgevingartænastu innan sjóvinnu v.m.

Hesar tænastur vera veittar til feløg, stovnar og persónar v.m.

Fyritøkan er staðsett: Við Sjógv 74, FO-410 Kollafjørður.

Fyri at kunna veita og útinna okkara tænastur viðgera vit persónupplýsingar. Henda dátuverndarkunningin fevnir um tær leiðreglur, ið eru galdandi fyri alt okkara kunda- og/ella persónssamskifti, har vit viðgera persónupplýsingar.

Leiðreglurnar hava vit gjørt, og tær eru í samsvari við dátuverndarlóggávuna, løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020.

## 2. Ábyrgd og endamál

Faroe Maritime Services Sp/f er dátuábyrgdari, og tað merkir, at vit hava ábyrgd av viðgerðini av teimum persónupplýsingum, ið vit móttaka frá tær ella útvega okkum frá alment atkomuligum keldum. Sum kundi hjá Faroe Maritime Services viðgera vit persónupplýsingar um teg. Endamálið við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingar er:

- At útinna avtalaðu tænastur fyri teg og títt felag.
- At halda tær rættarskyldur, ið eru álagdar okkum – eisini í samstarvi við almennar myndugleikar, har tað kann vera krav, sum t.d. skyldur sambært grannskoðaralógini, hvítvaskingarlógini o.ø.
- At røkja kundaviðurskiftir og samstarv.

Í nøkrum førum er Faroe Maritime Services Sp/f dátuviðgerði. Tað er í sambandi við ávísar bókhalds-uppgávur, sjófyrisiting og mynstringar virki o.l. Í slíkum føri verður ein dátuviðgerðaravtala gjørd við kundan.

## 3. Rættargrundarlagið

Rættargrundarlagið fyri okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum er:

- Dátuverndarlógin §8, stk. 1, nr. 2: Viðgerðin er neyðug fyri at halda eina avtalu, sum skrásetti er partur í, ella fyri at gera tað, sum eftir áheitan frá skrásetta er neyðugt, áðrenn avtalan verður inngingin.
- Dátuverndarlógin §8, stk. 1, nr. 3: Viðgerðin er neyðug fyri at halda eina rættarliga skyldu, sum áliggur dátuábyrgdaranum.
- Dátuverndarlógin §8, stk. 1, nr. 6: Viðgerð er neyðug fyri, at dátuábyrgdarin ella ein triði persónur kann fylgja einum heimilaðum áhugamáli, um ikki áhugamál ella grundleggjandi rættindi hjá skrásetta, sum krevja vernd av persónupplýsingum, ganga fram um.

## 4. Skrásetingar

Faroe Maritime Services Sp/f viðger persónupplýsingar hjá skrásettum kundum, har ímillum upplýsingar um felagið, leiðslu felagsins og tess eigarum.

Tá uppgávur verða útintar, viðgera vit eisini fylgjandi persónupplýsingar, ið kundin hevur skrásett: starvsfólk, skuldarar, ognarar og samstarvsfelagar umframt onnur, ið hava týdning fyri uppgávuloysnina.

## 5. Persónupplýsingar

Fyri kundar okkara viðgera vit hesar persónupplýsingar:

- Vanligar persónupplýsingar sum t.d. navn, bústað, telefonnummar, teldupostadressu,
- Føðingardag, bankasamband, avrit av passi ella koyrikorti.
- Persónstal við skjalprógvi frá Taks.

Fyri at loysa okkara uppgávur viðgera vit hesar persónupplýsingar:

- Vanligar persónupplýsingar sum t.d. navn, bústað, telefonnummar, teldupostadressu,
- Føðingardag, bankasamband og lønarupplýsingar.
- Persónstal við skjalprógvi frá Taks.
- Møguliga viðkvæmar upplýsingar so sum yrkisfelagsligt tilknýti (fakfelag).
- Sjóskeiðir v.m.
- Annað, ið MLC krevur.

## 6. Víðarigeving

Um tað er neyðugt fyri at loysa uppgávuna, víðarigeva ella lata vit persónupplýsingar til aðrar móttakarar. Tað kann t.d. vera uttanhýsis grannskoðarar, ráðgevar og samstarvsfelagar.
Nakrir av okkara dátuviðgerum kunnu vera staðfestir uttan fyri ES/EBS. Í hesum føri tryggja vit okkum at hesir veitarar eru MLC skrásettir og liva upp til krøvini, ið MLC setir . Við hesum eru allir okkara dátuviðgerðar góðkendir í samsvari við ES-kommissjónina og krøvini í dátuverndarlógini.
Hendan víðarigeving hendir sostatt bert í teimum føri at ítøkiligar uppgávur vera loystar og ikki skipað.

## 7. Varðveitsla

Vit goyma persónupplýsingar, so leingi tað er eitt sakligt og lógligt endamál við at varðveita upplýsingarnar, harundir eisini við atliti at m.a. bókhaldslógini, samtykkisreglunum, fyrningarreglunum og/ella aðrari løggeving.

## 8. Tíni rættindi

Sambært dátuverndarlógini hevur tú rættindi í sambandi við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum. Um tú ynskir at nýta tíni rættindi, skalt tú seta teg í samband við okkum.

- **Rætturin til innlit (§ 26) og rætting (§27)**
  Tú hevur rætt til at fáa innlit í tær upplýsingar, sum vit viðgera um teg, og at fáa rangar upplýsingar um teg sjálvan rættaðar.
- **Rætturin til striking (§ 28)**
  Í summum førum hevur tú rætt til at fáa upplýsingar um teg sjálvan strikaðar, uttan so at vit av roknskaparligum ella løgfrøðiligum orsøkum meta, at tað er neyðugt hjá okkum at varðveita upplýsingarnar í eitt longri tíðarskeið.
- **Rætturin til viðgerðaravmarking (§ 29)**
  Í summum førum hevur tú rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at fáa viðgerðina avmarkaða, kunnu vit framyvir í útgangsstøðinum bert goyma persónupplýsingarnar.
- **Rætturin til mótmæli (§ 32)**
  Tú hevur í summum førum rætt til at mótmæla okkara viðgerð av tínum.

- **Rætturin til dátuflutning (§ 31)**

  Tú hevur í summum førum rætt til at fáa tínar persónupplýsingar útflýggjaðar í einum skipaðum, vanliga nýttum og teldutøkum sniði og at fáa hesar persónupplýsingar fluttar frá einum dátuábyrgdara til ein annan uttan forðing.

Tú kanst lesa meira um tíni rættindi á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum: www.dat.fo

## 9. Samband og kæra

Tú ert vælkomin at seta teg í samband við okkum á telefon +298 792001 ella á telduposti til pj@fms.fo

Tú hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgdur við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.

Tú finnur samskiftisupplýsingarnar hjá Dátueftirlitinum á heimasíðuni.

## Farspor (cookies)

Heimasíða okkara skrásetir tøknulig farspor, men verða tey hvørki nýtt til hagtøl, marknaðarføring ella Analytics. Bert neyðugu farspor verða nýtt fyri at heimasíðan skal virka væl, hesi farspor eru kravd av tøknini og kunnu tískil ikki veljast frá.

### Detailed cookie scan report for fms.fo

Cookieserve scans only the homepage of the website. To check cookies on all pages, try our advanced cookie scanner for free.

| Cookie | Domain | Description | Duration | Type |
|---|---|---|---|---|
| qtrans_front_language | fms.fo | This cookie is set by qTranslate WordPress plugin. The cookie is used to manage the preferred language of the visitor. | 1 year | Necessary |
| woocommerce_cart_hash | fms.fo | WooCommerce sets this cookie to determine when cart contents/data changes. | session | Necessary |
| qtrans_front_language | www.fms.fo | This cookie is set by qTranslate WordPress plugin. The cookie is used to manage the preferred language of the visitor. | 1 year | Necessary |